KÍ-EB/Streymur:

# Sundalagsmenn standa seg væl í Klaksvík

**KÍ skal leygardagin royna at fáa sín næsta sigur á rað til høldar, tá ið EB/Streymur vitjar í Klaksvík, men sundalagsmenn plaga at standa seg væl í Klaksvík**




*Klaksvíkingar halda seg hava ov gott lið til at liggja í botninum. Men skal hetta broytast, so er kravið ein sigur um vikuskiftið*

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kom væl við hjá KÍ, at teir síðsta leygardag loksins fingu nøkur stig til høldar, tá ið teir vunnu 2-1 á TB á Sevmýri. Um tað var veteranurin Kurt Mørkøre, ið gjørdi come-back á Tvøroyri, sum inspireraði til sigurin, er ilt at siga, men í Klaksvík vóna teir, at skeiva gongdin nú er komin at enda.

### Ov góðir til botnin

Liðskiparin hjá KÍ, Heðin á Lakjuni, sigur, at klaksvíkingar hava góðar vónir til dystin móti EB/Streymi, og hann heldur ikki, at so nógv skal leggjast í, at EB/Streymur hevur vunnið báðar dystirnar, ið liðini bæði hava spælt móti hvørjum øðrum higartil í ár.

- Tað sær gott út hjá okkum við fólki til dystin móti EB/Streymi. Vit hava einki leikbann, og eingin spælari er skaddur. Vit vóna, at dysturin á Tvøroyri var startskot til eina vend í úrslitunum hjá okkum, sigur Heðin á Lakjuni, sum heldur, at KÍ hevur alt ov gott fólk til at liggja so niðarlaga á stigatalvuni.

Á Eiði er eisini væl statt við fólki. Eins og undanfarna vikuskifti eru allir mans tøkir burtursæð frá liðskiparanum Jákup Martini Joensen, ið hevur verið skaddur ein stóran part av árinum í ár. Jákup Martin royndi at venja eitt sindur í vikuni, men hann fekk so nógv pínu, at óvist er, nær hann verður aftur á vøllinum.

At EB/Streymur hevur vunnið báðar dystirnar móti KÍ í ár 1-0 ger eisini sítt til, at sundalagsmenn hava góðar vónir til dystin, men teir siga eisini verða greiðar yvir, at talan er um ein truplan dyst í Klaksvík móti einum svangum KÍ-liði.

HB-TB:

# HB skal reisa seg

**Føroyameistararnir úr HB skulu reisa seg eftir ósigurin í Runavík farna vikuskifti, tá ið TB sunnudagin kemur á vitjan í Gundadali.**

UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í gomlum døgum vóru dystirnir millum HB og TB klassikarar í føroyskum fótbólti, men soleiðis er ikki longur. Men dysturin millum hesi bæði lið í Formuladeildini sunnudagin er ógvuliga umráðandi, tí bæði liðini hava stóran tørv á stigum.

### Allir mans tøkir

Bæði liðini tykjast verða at kalla fullmannaði til dystin. Havnarmenninir vóru nógv skerdir, tá ið teir vitjaðu í Runavík seinasta leygardag, tí tá vóru tríggir mans Rasmus Nolsøe, Rúni Nolsøe og Heine Fernandez leikbannaðir, meðan Johannes Joensen var skaddur.

Teir tríggir leikbannaðu spælararnir eru nú tøkir aftur, men krumtappurin í verjuni, Johannes Joensen, er tó ógvuliga ivasamur eftir skaðan, sum hann fekk í lokaluppgerðini móti B36 fyri tveimum vikum síðani.

Í HB er eingin ivi um, at dysturin móti tvøramonnum skal brúkast til at reisa seg aftur eftir ósigurin farna vikuskifti, og um HB ikki skal missa sambandið til tey bæði fremstu liðini, Skála og B36, er kravið ein sigur á TB.

Hjá tvøramonnum stendur eisini væl til við fólki. Tá ið TB seinasta leygardag á heimavølli tapti fyri KÍ, var Alexander Jovevic ikki við, tí TB í løtuni hevur seks útlendingar tøkar í hópinum, men bert loyvi at brúka fimm. Um Jovevic aftur hesaferð verður tann, ið noyðist at hyggja at frá síðulinjuni er ivasamt, tí í vikuni fór Bárður Dimon aftur til Danmarkar. Bárður er eins og Jovevic miðvallari, og tí er spurningurin, um Jovevic kemur aftur í hópinum fyri at tippa holið eftir Bárð Dimon.

TB liggur í løtuni aftast í Formuladeildini, og trý stig eru upp til næstaaftasta liðið. Hetta merkir, at TB hevur stóran tørv á stigum, um teir ikki skulu missa sambandið við liðini beint omanfyri.

# HB er størsti favoritturin

Tá hugt verður at hagtølunum fyri dystirnar, sum skulu spælast sunnudagin, so er einki at ivast í, at HB er størsti favoritturin. Fimm ferðir hevur TB vitjað HB í landskappingini seinastu tíggju árini, og hvørja ferð hevur talan verið um heimasigur. Og fleiri ferðir um rættiliga stórar av slagnum.

Annars staðfesta hagtølini eisini, at bæði B36 og GÍ hava eitt sera gott tak í ávíkavist Ruanvík og Gøtu. Báða staðni hevur talan bara verið um ein heimasigur seinastu tíggju árini.

Í Vági bendir nógv á eina tætta og málfátæka uppgerð, meðan KÍ oftani hevur havt trupulleikar av EB/Streymi, sum oftani hevur argað í Klaksvík.

Hvussu er og ikki, so hava hagtøl sjáldan avgjørt nakran dyst. Stuttlig kunnu tey tó vera at hyggja at, og á talvuni sæst, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í bestu deildini seinastu tíggju árini.

*-jm*

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| VB-Skála | - | 0-0 | 2-0 | 0-0 | - | - | - | - | - | - | - | 0-2-1 | 2-0 |
| ÍF-GÍ | 4-3 | 1-2 | - | - | - | - | 1-5 | 0-4 | 0-4 | 1-1 | - | 1-1-4 | 7-19 |
| KÍ-EB/S | 0-1 | 2-2 | 4-1 | 3-1 | 0-4 | - | - | - | - | - | - | 2-1-2 | 9-9 |
| HB-TB | 3-1 | - | - | 9-3 | - | - | - | 4-3 | - | 7-1 | 4-1 | 5-0-0 | 27-9 |
| NSÍ-B36 | - | 1-2 | 1-2 | 1-1 | 0-0 | 2-3 | 1-3 | 2-0 | 1-2 | - | 1-2 | 1-2-6 | 10-15 |

# Renna aftur niðan á Húsafelli



*Aftur í ár skipar SÍF fyri fjallarenning*

**Árliga summartiltakið hjá Sandavágs Ítróttarfelag verður leygardagin 27. august. Og aftur í ár verður eitt av tiltøkunum fjallarenning. Runnið verður niðan á Húsafelli**

RENNING
*tíðindaskriv*

Eins og í fjør fer Sandavágs Ítróttarfelag á summartiltakinum í ár at skipa fyri fjallarenning. Og aftur í ár verður runnið niðan á tað 591 metrar høga Húsafelli..

Vallað er allan vegin niðan á tindin og gott er at renna. Teir fyrstu, sum komu á mál í fjør, brúktu umleið 40 minuttir um at renna frá SÌF húsinum í Sandavági, niðan á tindin og omanaftur. Vinnari gjørdist Jóan Karl Joensen úr Kollafirði.

Renningin í ár verður skipað eftir sama leisti sum í fjør, og hon er rættiliga áskoðaravinarlig. Rennararnir verða ílætnir reyðar vestar, og av tí at væl er sýnt allan vegin niðan gjøgnum hagan, ber væl til hjá fólki í bygdini at fylgja teimum allan vegin.

Tilmelding til fjallarenningina er á tlf. 333843 áðrenn fríggjadagin 26. august. Vinnarin fær eitt gávukort, og lutakast verður eisini millum allar luttakararnar.